# Eingin ivi í Sumba

*1. deild: Toftamenn vunnu greiðan sigur á sumbingum, sum hava fingið eina soltna byrjan, men hóast trygga sigurin, sýndi dysturin eisini, at toftamenn hava sínar veikleikar*



*Tað var lítil og eingin ivi um úrslitið, tá toftamenn um vikuskiftið vitjaðu í Sumba*

***Mynd: Áki Bertholdsen***

JÁKUP MØRK

Tað var kanska ikki annað enn væntandi, at toftamenn skuldu kanna sær øll stigini, tá teir um vikuskiftið løgdu fóru til suðuroyðar at spæla móti sumbingum.

Hvat vónum undan kappingarárinum viðvíkur, so er heldur einki dulsmál, at stórur munur er á ætlanunum hjá báðum liðunum. Meðan sumbingar hava sett sær sum mál at halda sætið í bestu deildini, vilja toftamenn nevnliga gjarna sleppa upp móti tindunum, og hetta kom eisini til sjóndar í dystinum sunnudagin.

**Høvdu tamarhald á**

B68 var liðið, sum byrjaði betur. Teir vóru spælstýrandi meginpartin av fyrra hálvleiki, og sjálvur hildu teir eisini, at leiðslan væl kundi verið størri enn tey bæði málini, sum vóru, tá liðini bæði fóru til hálvleiks.

Undan fyrsta málinum hjá toftamonnum fingu teir tó ein hvøkk, tá Dánjal Johan Joensen royndi seg úr á leið 40 metra fjarstøðu. Bólturin støkk tó á tvørtræðið, og so var vandamesta royndin hjá Sumba í fyrra hálvleiki av.

Brasiliumaðurin, Marcello, legði útiliðið á odda, tá einir 20 minuttir vóru leiktir. Bólturin varð stungin inn um sumbiarverjuan, og einsamallur við Eigili Olsen kundi Marcello seta bóltin í netið.

Fáar minuttir seinni kundi Fróði Benjaminsen økja til 2-0, og sum skilst var hetta málið beint eftir bókini. Marlon sendi hegnisliga bóltin inn um verjuna, har Øssur longu hevði sæð møguleikan og við fullari ferð rann ígjøgnum rangstøðufelluna. Bólturin varð síðani trillaður út frá til Fróða, sum ikki hevði stórvegis trupulleikar av at geva seinasta skumpið í málið.

**Dovanði móti endanum**

Seinna umfari høvdu toftamenn eisini leikliga yvirvág fyrstu løtuna, og tað eydnaðist teimum eisini at økja upp í 4-0, soleiðis at ivi ikki skuldi verða um úrslitið.

Fyrra málið skeyt Súni Fríði Johansen upp á brotsspark, eftir at Øssur Hansen varð feldur inni í brotsteiginum, meðan Fróði Benjaminsen skeyt seinasta toftamálið, tá hann brádliga gjørdist leysur inni í brotsteiginum.

Sum vera man, so dovnaði spælið eisini nakað, so hvørt sum sigurin gjørdist alt meira vísur, men móti endanum fekk Sumba kortini lagt eitt hampuligt trýst á B68 málið.

Hetta gav eisini úrslit í einum máli, sum innskifti Jan Poulsen stóð fyri, men tá vóru teir 90 minuttirnir longu leiktir, og meira enn troystarmál gjørdist ongantíð talingur um.

**Lítla breidd**

Toftamenn hava nú vunnið sær seks stig fyri tríggjar dystir, og hóast teir vóru við undirlutan móti B36 fyri viku síðani, so munnu viðhaldsfólkini tó hava góðar vónir um eina endastøðu ovarlaga á stigatalvuni.

Størsti trupulleikin er tó uttan iva, at liðið so at siga onga breidd hevur, og at skaðar og leikbann tískil raka sera meint. Móti Sumba framdi Jóannes Jacobsen tríggjar útskiftingar, og serliga tvær teirra vóru nokk so sigandi fyri breiddina í hópinum.

Tá hálvur tími restaði, varð 16 ára gamli Jann Ingi Petersen sendur á vøllin, og tá átta minuttir vóru eftir at leika, sendi 39 ára gamli venjarin seg sjálvan á vøllin!

Tað er eitt sindur fráliðið, síðani Jóannes seinast leikti fyrstudeildarfótbólt her heima, og einki er at ivast í, at vóru aðrar loysnir, so hevði hann nýtt hesar, heldur enn at senda seg sjálvan á vøllin.

**Verður tungt**

Hjá sumbingum er einki at ivast í, at tað verður sera striltið at halda sessin í bestu deildini í eitt ár afturat.

Serliga er tað tann sannroynd, at fleiri av hinum liðunum, sum væntandi skuldu stríðast við sumbingarnar, longu hava kraddað sær fleiri stig, og at sumbingar tí longu nú eru um at verða sigldir afturúr.

Komandi vikuskftið skulu teir í Gundadal at leika móti B36, og hóast teir altíð geva seg fult út á vøllinum, so er neyvan væntandi, at teir fáa stig burtur úr hesum dystinum.

Toftamenn hava heimavøll móti sandoyingum komandi vikuskifti, og megna teir eisini at fáa fulla úrtøku úr tí dystinum, eru teir um at vera væl við í oddinum aftur.

Sum nevnt, so krevst tó nakað av hepni i nnan skaða- og karantenuøkini, um toftamenn skulu halda sær ovarliga í deildini alt kappingarárið, men hinvegin er sjáldan at hoyra um lið, sum liggja ovarliga hóast tey ikki hava neyðuga hepni.

**Sumba-B68 1-4 (0-2)**

0-1 Marcello 20.
0-2 Fróði Benjaminsen 26.
0-3 Súni Fr. Johansen 81 (br.)
0-4 Fróði Benjaminsen 81.
1-4 Jan Poulsen 90.

Dómari: Suni Johansen

**Sumba:**

Eigil Olsen - Dánjal Johan Joensen, Marlon Kjærbo, Brgur Vinther - Mortan úr Hørg, Sasa Tomajek, Spasoje Biberdzic, Hans Jacob Thomsen, Nikola Biberdzic - Eirkur Joensen, René Thomsen

**B68:**

Magnus Poulsen - Mannbjørn Nesá, Jan Dam, Arnbjørn Danielsen, Jákup Eli Olsen - Fróði Benjaminsen, Øssur Hansen, Marlon, Eyðstein Skipanes - Súni Fríði Johansen, Marcello

# Málleyst í Leirvík

*2. deild: Eftir tvey umfør hava leirvíkingar bert fingið eitt stig, og hetta er ikki nóg mikið, um teir aftur í ár ætla sær ein leiklut í toppinum av deildini*

LÍF–NSÍ 0–0

Leirvíkingar plaga at teljast millum tey liðini, sum eru við í stríðnum um uppflyting. Tað hevur verið roknað við, at teir aftur í ár skuldu vera í tí bólkinum, men úrslitini higartil boða ikki frá oddastríði.

Eftir tapið í Fuglafirði í fyrsta umfarinum hevði LÍF leygardagin vitjan av næstbesta liðnum hjá NSÍ. Tað endaði málleyst, og leirvíkingar høvdu als ikki eyðsýnda yvirvág.

Eitt sindur undarligt tóktist tað, at LÍF var varðið í útgangsstøðuni og dúvaði upp á snarálopsmøguleikar.

Uppløgdu málmøguleikarnir vóru fáir. Bergur Djurhuus hjá NSÍ kom leysur í vinstru í 1. hálvleiki. Møguleikin at skjóta var góður, men hann tøvdi ov leingi og varð takladur.

Eftir snarálop hevði Jonhard Høgnesen hjá LÍF góða roynd sum var bjargað á strikuni. Í 2. hálvleiki var LÍF greitt omaná, men uppløgdu møguleikarnir vóru fáir. Fróði Jóannesarson kom inn á liðið hjá NSÍ í 2. hálvleiki, og tað var um reppið, at hann eftir horna skoraði sigursmálið. Men stútarin varð bjargaður á strikuni.

Leygardagin fær NSÍ vitjan av KÍ, meðan LÍF skal suður til Hvalbiar.



*Runavíkingar hava fingið eina góða byrjan í aðru deild við fýra stigum fyri tveir dystir*
***Mynd: Jonhard Hammer***



# VB vann í Klaksvík

*Steypakappingin: Vágbingar vunnu 3-2 á KÍ, men tað var ikki nóg mikið til at tryggja sær fremsta plássi í bólkinum*



*Tað eydnaðist vágbingum at vinna útidystin í steypakappingini móti KÍ*

***Mynd: SáH***

Vágbingar vunnu, tá teir spældu útsetta steypadystin móti KÍ.

Dysturin, sum var spældur í góðveðrinum í Klaksvík fríggjakvøldið, endaði við, at VB vann 3-2. Men hesin sigur var ikki nóg stórur til at tryggja VB fremsta plássið í bólkinum. Tað plássið eigur KÍ, hóast teir taptu tveir teir síðstu dystirnar í bólkaspælinum.

VB kom á odda í fyrra hálvleiki, tá Milan Kuljic fekk fatur á einum bólti stutt uttanfyri KÍ-brotsteigin. Hann gjørdi skjótt av og smekkaði til. KÍ-málverjin hevði ringt útsýnið, og áðrenn nakar visti av, hevði bólturin smoygt sær í málið.

Bæði liðini vóru annars nær við at skora fleiri mál í fyrra hálvleiki. Ungi KÍ-miðvallarin, Símun Joensen, stútaði bóltin á tvørstongina eftir hornaspark, og einar tvær ferðir forðaði Gunnar á Steig fyri, at VB skoraði.

Arnold Joensen byrjaði á beinkinum, men 10 minuttir fyri hálvleik var hann sendur á vøllin. Og hann var ikki meira enn komin á vøllin, so hevði hann javna til 1-1. Rógvi Jacobsen vendi sær í VB-brotsteiginum og skjeyt. Bjarni Johansen bjargað frálíka væl, men so fylgdi Arnold upp, og støðan varð 1-1.

**VB omaná**

Liðni stóðu á jøvnum, tá tey komu út aftur frá fyrra hálvleiki. Men tað gekk ikki long tíð, so hevði VB lagt seg fram umaftur, og enn eina ferð var tað Milan Kuljic, sum skoraði.

Miðframherjin hjá KÍ, Ovi Nysted, javnaði, tá eitt korter var eftir at spæla. Arnold legði inn fyri úr høgru, og so var Ovi fyrstur á bóltinum og stútaði hann í málið til 2-2.

Eftir hetta trýsti KÍ fyri at vinna dystin. Tomislav Sivic var komin á vøllin, og hann skapti fleiri ferðir vandamiklar støður á VB-hálvuni.

KÍ kom fleiri ferðir nær, og einu ferðina rakti bólturin innaru síðuna av stongini, áðrenn ein VB-spælari sparkaði burtur.

Í hinum endanum vóru VB'arnir alla tíðina førir fyri at bjóða av, og tað endaði eisini við, at tað vóru teir, sum drógu longra stráið.

Krzystof Popzcynski kom at standa væl fyri í KÍ-brotsteiginum, og hann sendi bóltin í netið við einum fløtum skoti.

3-2 til VB, og so kom KÍ ongantíð rættiliga afturíaftur. Men teir hildu tætt í verjupartinum, og tað var so við til at tryggja teimum sigurin í bólkinum.

Stutt fyri leiklok mátti Jan Andreasen fara av vøllinum, tí hann koykti fótin, sum hann hevur havt trupulleikar við seinastu vikurnar.

**EK**

**KÍ-VB 2-3 (1-1)**

0-1: Milan Kuljic
1-1: Arnold Joensen
1-2: Milan Kuljic
2-2: Ovi Nysted
2-3: Krzystof Popzcynski

# Fótbóltshøll kemur í Føroyum

*Formaðurin í Fótbóltssambandinum er ivaleysur í, at ein fótbóltshøll verður bygd í Føroyum innan ov langa tíð*

EYÐUN KLAKSTEIN

FSF-bossurin, Tórleif Sigurðsson, kennir seg vísan í, at ein fótbóltshøll verður bygd í Føroyum innan ov langa tíð. Hann metir, at hendan høll fer at gerast veruleiki innan eini fimm ár.

Aðra staðni í norðurlondum, har veðurlagið ikki er til fótbólt alt árið, er fótbóltshøllir bygdar, har dystir kunnu spælast innandura. Í hesum høllum er ein graslíkisvøllur í fullari stødd.

Í februar mánaði í ár tóku íslendingar eina slíka høll í nýtslu. Høllin, sum er á Reykjanes, kostaði yvir 30 milliónir krónur at byggja, men íslendingar ætla sær at byggja fleiri slíkar høllir næstu trý-fýra árini.

Íslendska fótbóltssambandið væntar, at hetta fer at hava stóran menning við sær fyri íslendskan fótbólt.

– Vit rokna við, at íslendskur fótbóltur kemur á eitt hægri støðið, og tað fer eisini at síggjast aftur í altjóða fótbólti, sigur Omar Smararson, pressustjóri í íslendska fótbóltssambandinum.

**Inniloka ein vøll**

Í Føroyum er veðurlagið eisini ein trupulleiki, og formaðurin í FSF, Tórleif Sigurðsson, væntar, at ein fótbóltshøll verður bygd í Føroyum innan ov langa tíð.

– Skal meta um tað, so rokni eg við, at vit hava eina slíka høll í Føroyum innan fimm ár, sigur hann.

Hann heldur, at tað ber til at gera eina bílagari høll enn hana, sum íslendingar hava gjørt.

Hann sigur, um høllin verður bygd sum ein venjingarhøll upp at einum stadionøki, har skiftirúm og annað er nærindis, ber til at sleppa væl bíligari enn tað, sum tað hevur kostað at gjørt høllir aðrastaðni.

– Vit kunnu til dømis hugsa okkum, at klaksvíkingar, sum nú eru farnir at byggja skýli og helst skulu skifta teppið á vøllinum, tí tað skapar trupulleikar í regni, innlokaðu verandi vøll. Tað hevði ikki verið nógv dýrari enn eitt skýlið og eitt nýtt teppi á vøllin, sigur Tórleif Sigurðsson.

FSF-formaðurin sigur, at FSF í løtuni ikki hevur møguleika at vera við í fíggingini av eini fótbóltshøll, men hann er fullvísur í, at FSF hevði nýtt høllina, um hon kom.

Hann heldur eisini, at tey, sum fáa høllina, fara at verða frammaliga í fótbólti nógvu komandi árini.

**Støðan í bólki A**

| lið | d | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 KÍ | 6 | 4 - 0 - 2 | 17 | 8 | 9 | 12 |
| 2 NSÍ | 6 | 3 - 0 - 3 | 10 | 6 | 4 | 9 |
| 3 VB | 5 | 3 - 0 - 2 | 11 | 8 | 3 | 9 |
| 4 Sumba | 5 | 1 - 0 - 4 | 3 | 19 | -16 | 3 |

Dysturin, Sumba-VB, verður leiktur í morgin, 10/5

# ÍF vann stórt í Klaksvík

*2. deild: Uttan stórvegis hóvasták togaðu Fuglfirðingar næsta sigurin á árinum í land*



KÍ-ÍF 1-7 (0-1)

Fuglfirðingar vunnu stórsigur, tá teir spældu dyst í Klaksvík leygardagin. Men tá ein tími var spældur var eingin stórsigur í eygsjón hjá niðurflytarunum úr Fuglafirði.

Tá var støðan 2-1 til ÍF, men KÍ hevði verið væl við í dystinum.

Fyrri hálvleikur var rímuliga javnur, men ÍF'arnir vóru nakað naskari. Í einum tveimum støðum var tað málverjin hjá KÍ, Meinhardt Joensen, sum bjargaði heimaliðnum.

Hann var tó prísgivin, tá Rúni Petersen fekk fatur á bóltinum og smekkaði til uttanfyri brotsteigin. Bólturin rakti ein verjuspælara hjá KÍ og broytti kós.

Tá liðini fóru til hálvleik var støðan 1-0 til ÍF, men seinastu løtuna undan steðginum var KÍ komið meira við í dystin. Og tá liðini komu aftur á vøllin, hevði KÍ yvirtakið eina løtu.

Hesa løtuna fingu teir eisini málið hjá sær. Eitt gott skjótálop endaði við, at Aksel Johannesen legði inn fyri úr høgru síðu, Helmar Lassen var fyrstur á bóltinum og sendi fram við ÍF-málverjanum.

**Dusaðu sær**

Tað gekk ikki lang tíð, so hevði ÍF lagt seg á odda aftur. Málið var eitt sindur umstrítt, tí klaksvíkingar hildu, at Bárður á Lakjuni hevði fingið hjálp frá sínari egnu hond, tá hann gjørdist leysur, men hvørki dómarin ella linjuverjin lótu við seg koma, og so var 2-1 til ÍF.

Tá ÍF skoraði til 3-1 við máli, sum Eyðolvur Petersen gjørdi, tá hann fluktaði bóltin í kassan, fór luftin úr heimaliðnum.

KÍ valdi at flyta ein verjumann fram á miðjuna og spæla við trimum í álopinum, tað sum eftir var av dystinum, og tað gjørdi, at opið var í verjuni, har Bárður á Lakjuni og Rúni Petersen dusaðu sær.

Rúni skoraði tvær ferðir afturat, Bárður fekk eitt mál afturat, og Tórstein Joensen skoraði eftir hornaspark.

Tá samanumkom gjørdist tað ein tryggur sigur til ÍF, sum nú hevur lagt seg á odda í 2. deild. Klaksvíkingar bíða framvegis eftir fyrsta stiginum.

JH

**2. deild: KÍ-ÍF 1-7 (0-1)**

0-1: Rúni Petersen
1-1: Helmar Lassen
1-2: Bárður á Lakjuni
1-3: Eyðolv Petersen
1-4: Bárður á Lakjuni
1-5: Rúni Petersen
1-6: Tórstein Joensen
1-7: Rúni Petersen